

# TJÓÐLEIKHÚS


TJÓÐLEIKHÚS
95516

# Arkitektonisk hugmynd - sambindingarlið



Tjóðleikhúsið endurskapar eitt ítøkiligt samband millum býin og Skansan.
Ein nýggj og trygg gongufarleið frá bryggjutorginum og til Skansan verður innbygdur partur í arkitekturinum hjá nýggja Tjóðpallinum.

# Arkitektonisk hugmynd - skap



Tjóðleikhúsið liggur á einum vegamóti millum bý, bingjuhavn og innsigling.

Bygningurin hevur eitt organsikt skap sum viðurkennir allar ættir.
Bygningurin vendir ongum baki.

# Arkitektonisk hugmynd - skap




**stev - takt**



Livandi / organiskt skap
Bygningsskapið er organiskt og lagar seg eftir grannaumhvørvi og gongufarleiðum.

Stev og takt
Sniðgevingin av framsíðunum hevur yvirskipaðar uppdeilingar ella taktir sum fylgja stevunum í dansinum, tvey long og eitt stutt.

Eldri frágreiðingar frá Jens Christiani Svabo um skap og takt í føroyskum dansi
Jens Christian Svabo
"..:Den almindelige gamle færøske, da man holder hin anden i Haanden, og slutter en Kreds, større eller mindre efter værelset. Er samme for engt til den dansende Mængde, brydes Ringen som man siger, den ene Side af samme indbøjes og ifald Rummet tillader det, faar Kredsen flere Krumninger.
Maaden at danse paa, er den simpleste. man gjør 2 skridt frem til venstre Side, stander, flytter den højere Fod hen til den venstre, derpaa henimod den højre, osv..."

Kelda: Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782 v. Jens Christian Svabo

Um huglagið í dansinum sigur Marie Eide Petersen:
"De dansendes minespil og hele rytmen afhang af foredraget i det, der blev sunget. Blev der sunget om store bedrifter, rejste man hovedet, vendte sig til sideemanden og trykkede ham fast i hånden; var det svig og list, det drejede sig om, havde man et alvorligt drag om munden og trådte mere hårdt til; blev der sunget om kærlighed, var udtrykket mere ømt."

kelda: "Føroyskur dansur, studier i sangtradisjonen på Færøyene" v. Astri Luihn,

Íblástur
Føroyski dansurin, livandi veran, dramaið, felagsskapurin, stevini og taktirnar eru íblásturin til arkitekturin í tjóðleikhúsinum.

Føroyski dansurin er felagsskapur og mentanarligur arvur. Hann er demokratiskur - øll kunnu vera við.
Flestu gamlar mentanir hava okkurt slag av skipaðari læring við rørslu/kroppi, tað kann vera dansur og ofta er tað kampsportur so sum thai chi, karatee jiujitsu osfr Tað sum eyðkennir tílíkar gamlar kropsteknikkir er at centrið "the core" verður hildið í water, soleiðis er eisini við føroyska dansinum. Flestu føroyingar vita tað uttan at varnast, tí leggja vit skjótt til merkis tá ein útlendingur kemur upp í dansin. Tey flyta centrið upp og niður, meðan føroyingarnir halda tað vatnrætt.
Í felag at halda centrið vatnrætt merkjur at ringurin gerst ein vera ella ein mekanisma - ringurin hevur eitt vatnrætt centur - eitt punkt vit øll kropsliga møtast.
í føroyska dansinum kunnu vit í felag fáa eina uppliving av at "vera uttanfyri okkum sjálvi" - tað er sunt tí vit eina løtu kasta ego´ið frá okkum. Tá ið vit sita í salinum og geva okkum yvir til sjónleikin, verður fokus flutt frá okkum sjálvum og yvir á forteljingina - vit gloyma ego og kunnu lata upp fyri at gerast kensluliga rørd av onkrum øðrum/sjónleikinum.

Føroyski dansurin er um somu tíð unisonur og mangfoldigur.

Endurtøkurnar og at "køre over venepumperne" ger at dansurin kann vera trancenderandi. Endurtøkurnar og ringurin virkar hypnotiserandi og venupumpurnar útloysa serotonin, sum tá ið man rennur leingi.


Farðstøð
Møguligt byggiøkið
Skoytibreyt
Útipallur
Høvðusinngongd
kt. +7,5
kt. +11,5
kt. +15,5
kt. +11,5
kt. +2
kt. +1,5
kt. +1
Havnabussur
Bátadráttur
0 10 20 50 100
1:500

# Sambindingarlið - ein nýggj Skansafarleið



Lendisskurður




## Fornminni

Skansin er eitt av okkara fremstu fornminnum og tað einasta av sínum slagi.
Tá skansin var bygdur, var hann verjan hjá havnarfólki og ímóti sjórænarum.
Meðan í dag liggur skansin óvirkin og er ein tíðarlummi og eitt fríøki, mitt í meldrinum við havnarlagið.

## Nýggj gongufarleið

Ferðafólk hava altíð verið drigin at Skansanum. Vaksin og børn hava spákað har og brúkt skansan sum sítt frístað og spæliplláss.
Síðan sambandið millum Skansabrekku og Skansan varð slitið, hevur verið tvørligt hjá fólki at sleppa út á Skansan til gongu og nærum ómøguligt hjá rørslutarnaðum.
Høvuðstætturin hjá nýggja tjóðleikhúsinum er at bjóða fólki eina nýggja og trygga gongufarleið út á Skansan.

## Tung ferðsla

Tung ferðsla frá bingjuhavnini koyrir framvið Skansanum og koyrir úr býnum eftir vegnum Yviri Við Strond. Smb. heildarætlanini hjá Tórshavnar kommunu, verður sjálvstøðugt koyrispor gjørt til tunga ferðslu frá bingjuhavnini.
Skansin er sostatt umskarðaður av koyrivegi við tungari ferðslu og farleiðin er vandamikil hjá fólki til gongu.

## Trappan

Ein 276 metrar long trappa snarar seg um Tjóðleikhúsbygningin og førir teg frá Bryggjutorginum og upp á takið í 14m hædd, hagani ein brúgv førir teg út á Skansan.

## Trapputorn

Mælt verður til at gera eitt trapputorn við lift við vegjaðaran Tjóðleikhúsmegin, sum førir upp til brúnna frá Tjóðleikhúsinum. Við hesum verður trygga farleiðin til Skansan eisini møgulig hjá koyristólsbúkarum.

## Brúgv

Brúgvin røkkur frá Tjóðleikhúsinum á kotu 15.73 og til parkeringsøki við Skansan á kotu 16,0. Brúgvin er íalt 40m long og er longsta spennið 30m millum trapputorn og Skansan.
Fríhæddin undir brúnnið er 11,5m, til samanberingar er fríhæddin á motorvegsbrúm 4,5m. Brúgvin kemur sostætt ikki at darva farmaflutningi úr bingjuhavnini.

# Vit møtast á leikhúsbryggjuni












Tjóðleikhúsið verður drívmegin, sum fer at skapa lív og felagsskap á havnaøkinum, alt árið.
Tjóðleikhúsið er fyrst og fremst ein pallur til framførslur innan leiklistina.
Men, Tjóðleikhúsið er eisini ein mentanarstovnur sum ynskir at koma á tal við umheimin. Tað er har viðurskifti og støður verða viðgjørd, sum havar týdning fyri okkum sum einstaklingar og sum samfelag. Tjóðleikhúsið skapar karmar til samtalu í- og uttanfyri leikhúsið. Her hittast allir samfelagsbólkar, leik og lærd.

Vit vitja pallarnar fyri at síggja og hoyra aktuellar framførslur, vit møtast við vinfólki á kaféini til eitt prát afturvið einum kaffimunni ella einum góðum bita. Góðveðursdagar stevna vit oman í havnina og seta okkum við bryggjukantin at dyppa føtur í sjógvin. Ella, vit taka "trappuna" við kós móti skansanum og steðga á eina løtu á takinum. Har er "rooftop" kaféin við panorama útsýnið yvir býin og bryggjutorgið. Har ber til at fylgja við í virkseminum á torginum, fáa eitt prát við kenningar og njóta ein ís ella heitt kakao á terrassuni framman fyri "rooftop kaféini".
Á Bryggutorginum gera tey klárt til útileik. Ein skúlaflokkur ger seg út at fara ein fiskitúr við sluppuni og á leikhúsbryggjuni eru fleiri fólk savnaði at síggja eina dansiframførðslu
Havnabussurin er komin av vestarubryggju við ferðafólki og leggur at á leikhúsbryggjuni
.

0 10 20 50 100







## Høvuðsdisponering

Byngingurin er í trimum hæddum, við eini kafé á takinum. Ein glasbygningur verður bygdur runt um pallhústornið fyri at skapa ein ljóðbuffara um tornið. Glasbygningurin verður skipaður soleiðis at í honum verður pláss fyri eini kafé.

### Hædd 3

Starvsfólk í umsitingini og leikarar verða lyft upp á triðju hædd, hagani teey hava gott útsýnið yvir býin og innsiglingina.

### Hædd 1

Á veghæddini, hædd 1, eru funktiónir sum hava tørv á beinleiðis sambandi við tún og koyriveg. Eitt nú Foyer, pallar og verkstøð.
Leikhúsgestir hava lætta atgongd til bryggju og torg frá Foyer økinum og verkstøðini hava lætta atgongd til koyrivegin í sambandi við til- og frá koyring av vørum.

### Hædd 2

ein innskotin hædd liggur ímillum hædd 1 og 3, sum eru hølir ið liggja í ein krans rundan um pallarnar. Í hesum høllum eru tøknirúm sum eru knýtt at pallunum og húsinum.Her liggja eisini fjargoymslur við góðum sambandi til verkstøð umvegis vørulyft.



# Modelmyndir









# Flatmynd Hædd 0



# Flatmynd Hædd 1




5516

# Flatmynd Hædd 2



# Flatmynd Hædd 3




91556

# Flatmynd Hædd 4



Fyri framman leiktjøldini  - leikhúsgestir



# Fyri framman leiktjøldini - leikhúsgestir







Hædd 1 - gestaøkið

### Atmosfera
Ein vitjan á leikhúsinum byrjar í Foyerini. Tú skalt merkja at tú trínir inn í ein annan heim, sum lyftir teg upp úr gerandissjabbinum... og tínir sansir kveikjast.
Foyerin skal megna at fáa teg sum leikhúsgest at kenna teg serstakan og pallsettan. Títt forvitni er vakt og spenningurin eftir at síggja sýningina veksur.

### Tjaldveggur
Ein bylgjuskapaður veggur, sum ímyndar eitt leiktjald, eyðmerkir ein greiðan skilna ímillum gestaøki og leikøki.
Í tí tú fer úr foyerinum og trínur inn um "leiktjaldið", broytist umhvørvið týðiliga. Handan tjaldið er alt óljóðið frá gerandisdegnum horvið og gandakenda ljóssetingin av rúminum setir teg í rætta huglagið.

### Foyer
Foyerin er rúmlig og røkkur um allar tríggjar salirnar. Hagani er inngongd til stóra sal, líttla sal og Black Boxina.
Bylgjurnar í tjaldvegginum geva eina ábending um hvar salirnir eru og lætt er at finna rætta salin. Foyerin er rúmlig og kann rúma ymsum innrættingum. Hon er nóg rúmlig til at allir tríggir salir, hava sýningar sama dag.
Foyerin hevur høgt til loftið móti tjaldvegginum og er lægri í uppihaldsøkinum úti við fasaduna.
Høvuðsinngongdin er atkomulig fyri øll og hevur aut.skjótihurðar. Tættast við inngongdina liggja toilettir og garderoba.

### Billett- og kaffistova
Ein felags diskur til billett- og kaffisølu, stendur framman fyri tjaldvegginum og røkkur um allan stóra sal. billettsølan er tættast móti inngondini.

Kaffistovan hevur vælútgjørdan køk og hevur umstøður til at bjóða eina matarskrá. Soleiðis at kaffisølan kann bjóða til Bruntsj, miðmála og døgurða og vera virkin allar dagar, eisini í tíðarsekiðinum ímillum sýningarnar.

### Sølubúð
Ein innrætting til sølu av skreytlutum, listabókum, plakatum o.øðrum viðkomandi lutum, er næst høvuðsinngongdini og kann røkkast hjá starvsfólkum í billetsøluni. Sølubúðin er innrættað sum eitt opið framsýningarøkið, við innrættingum sum eru innbjóðandi, eisini hjá børnum. Eitt nú kunnu verða innrættingar við dukkuteatrum sum børnini kunnu røra við og evt. royna seg í kynstrinum at halda snóradukkum.

### Framsýningar
Til serlig høvir, temadagar, sersýningar og annað ber til at seta upp framsýningar. Foyerin er skipað soleiðis, at pláss er fyri at hava framsýningar standandi í eina tíð. Framsýning kann vitjast av ymsum áhugabólkum, skúlaflokkum, gestum sum vitja í kaffistovuni umframt leikhúsgestum til sýningar. Framsýningin er tá við til bæði at skapa meira virksemi í húsinum og til at røkka út til fleiri fólk.

### "Roof Top"
Ein kafé við útsýni yvir býin er staðsett á takinum, framman fyri pallhústornið.
Atgongd er til kaféina frá Foyer og frá trappuni. Kaféin kann verða eitt útferðarmál hjá fólki sum heild, men kann eisini verða ein partur av leikhúsvitjanina. Tað kann til dømis verða har gestirnir møtast aftan á sýningina og skifta orð um tað tey hava sæð, ímeðan tey njóta býarljósini og stórbýardámin.





# Handan leiktjaldið



# Handan leiktjaldið - umsiting




Hædd 1




Hædd 3




Hædd 4 - "Rooftop"

## Uttanhýsis starvsfólk

Starvsfólk sum ikki hava fast arbeiðsstað á tjóðpallinum, men sum eru knýtt at virkseminum í eitt tíðarskeið, eitt nú leikstjóri, pallstjóri, dramaturgur v.fl. skulu hava eitt skrivstovupláss og atgongd til fundarhølir, kopirúm osfr.
Eitt framløgurúm nærhendis trapputorninum móti eystri, kann m.a. brúkast til listarliga leiðslutoymi, har modell av scenografiini, búnatekningar, tekstuppskot, búnaprøvar o.a. kunnu liggja.

## Eitt virkið leikhús

Tjóðleikhúsið er virkið alt árið. Ímeðan ein leikur verður sýndur verður næsti leikur framleiddur, alt ímeðan triðji leikurin verðu fyrireikaður osfr. Henda áhaldandi tilgongdin krevur at tjóðleikhúsið rúmar tí krevst, til uppsetan av einum leiki. Alt frá fyrireiking av einum nýggjum leikum, til venjing av framførðslum, framleiðslu av pallist og sýning av leikum.
ein leikur er ein framleiðsla sum krevur at fólk innan fleiri fak- og listagreinir samstarva. Í innrættingini av tjóðpallinum er dentur lagdur á at arbeiðsumstøðurnar skulu bæði verða praktiskar og kveikjandi. Tað skal verða sjónligt samband millum fakini og lætt at samskifta og samstarva. Við betri innlitið í virksemi hjá starvsfeløgunum, verður betri forstáilsi og lættari at skapa kensluna av at røkka felags málum.

## Umsiting

Umsitingin, tann dagliga leiðslan, situr á triðju hædd við góðum útsýnið yvir býin.
billet- og kaffisøla
Lyft og trappa hava beinleiðis samband við tvær starvsfólkainngongdir ávikavist móti norði og móti eystri á veghæddini. lyft og trappa móti norði hevur beinleiðis samband við foyerin.
Starvsfólk sum arbeiða í billettsøluni og kaffistovuni, hava samband við starvsfólkahølini á triðju hædd umvegis lyftu og trappu. Billettsølan og kaffisølan eru innrættaði við sama disk, sum ger tað møguligt hjá einum starvsfólki at røkja báðar funktiónirnar. Sølubúðin er opin framsýning sum liggur við sjónligum sambandi til billettsøluna.

# Handan leiktjaldið - leikarar




Hædd 1




Hædd 3

## Leikarar

Arbeiðið sum útinnandi listafólk á einum leikpalli, inniber m.a. at miðla kenslur umvegis leik, dans og sang. Henda eksponering og kenslan av húðleysheit setur høg krøv til teirra umhvørvið. Skiftirúmið, garderoban, er teirra frírúm, har tey løða upp orku, repetera tekst, hugsavna seg ella taka bráddin av nervunum. Garderoban hjá leikarunum, er rúmlig. Tveir leikarar eru um hvørja garderobu. Hár- og sminkurúmið liggur á triðju hædd, nær við garderoburnar hjá leikarunum. Felagstilhaldsrúmið eisini rópt "greenroom" liggur nærhendis eystara trapputorn, sum hevur beinleiðis samband við pallarnar á hædd 1.
Greenroom er savningarstaður hjá leikarum og teknikkarum ímillum venjingar og ímeðan sýningin er. Eitt eykað greenroon liggur á hædd 1, við umstøðum til búnaskift og at pifta sminkuna upp.

Ein typiskur arbeiðsdagur til sýning, hjá einum sjónleikara í Det kgl.Teater:

*Parkera súkklu ella bil*
*tjekka inn*
*Inn í garderobuna at hanga jakka, seta tasku og skifta í venjingarklæði*
*í kantinuna at taka okkurt at drekka*
*í ítróttarrúm at hita kropp upp*
*Í repititiónsrúm at hita rødd upp við klaveri*
*mgl.eftir nývaskaðum búna*
*Í garderobuna at skifta til búna, leggja masku, hugsavna seg og mgl. taka ígjøgnum tekstin.*
*Í "skuespilfoyeren" at bíða til man skal á pallin. Her bíðar man møguliga eisini tá ið tað er sýning og man ikki er við í teimum scenunum, sum verða spældar. Her er man klárur at fara á pallin uppá stikorð.*

*Aftaná sýning:*
*Í garderobuna*
*Sminka av*
*Í bað*
*Hita rødd og kropp niður*
*Lata seg í egin klæðir.*
*Møguliga leggja skitin búnaklæðir til vask.*
*Tjekka út við lykli*
*Til hús.*

*Til venjing*
*Parkera súklu ella bil*
*Inn á garderobuna at heingja jakka, seta tasku og møguliga skifta til venjingarklæðir.*
*Í kantinuna, ella aðrastaðni, at taka okkurt at drekka.*
*Í ítróttarrúm at hita kropp upp.*
*Í repetitiónsrúm at hita rødd upp við klaveri.*
*Í garderobuna at arbeiða við teksti og leikluti. Møguliga venja saman við øðrum leikara/leikarum.*
*Møguliga arbeiða við uppskotum til masku.*
*Um venjingin er við búna og makeup- Skifta og leggja masku.*
*Aftaná venjing.*
*Í garderobuna at skifta og sminka av um venjingin er við búna og masku.*
*Í bað um arbeiði hevur gjørt teg skitnan.*
*Til hús.*



# Handan leiktjøldini  - framleiðsla






## Framleiðsla

Verkstøðini liggja øll í eini røð runt um pallarnar. Tey liggja út móti vindeygafasaduni við góðum dagsljósi. Samstundis verður virksemi sjónligt hjá  fólki sum ganga framvið bygninginum. Verkstøðini skapa lív og gerða umhvørvið meiri áhugavert at ferðast í.
Verkstøð sum støva og larma so sum Snikkaraverkstaðið, smiðjan og sveisi verkstaðið liggja aðrumegin monteringspallin og hini verkstøðini sum helst ikki skulu darvast av savispønum og dusti, liggja hinumegin pallverkstaðið
Nærgoymslurnar eru somuleiðis býttar í tvey, ein rein nærgoymsla til Ljóð- og ljósverkstaðið, seymistovuna og rekvisitt verkstaðin. Meðan Snikkaraverkstaðið, smiðjan og sveisi verkstaðið hava egna nærgoymslu tætt við.
Tvey portur eru til vøruinnkoyring. Eitt portur beinleiðis inn í snikkaraverkstaðið og eitt inn í monteringspallin. Ein vørulyft er næst við monteringspallin, hon røkkur upp á 2.hædd til fjargoymsluna og til pallkjallaran. Starvsfólk á verkstaðnum brúka starvsfólkahøli og umklæðingarrúm á triðju hædd.
Goymsla av stólum, teppum og leyspallagoymslu liggur í beinleiðis sambandi við Black Box.




Gangandi ferðsla
Bilar
Tung ferðsla
Hýruvognar
Ferðsla til ferju
Parkering
Buss steðgipláss
Rusk innheintan
Vøruinnlating

# Skurður


21.93
Café
"Rooftop"
15.73
Palltorn
Garðhavi
Umklæðing
Skrivstova
11.04
11.73
Goymsla
Balkon
7.60
Bakpallur
Pallur
Salur
Foyer
1.98
-1.49

# Ljóðviðurskifti






Ein neyv planlegging av ljóðviðurskiftunum í bygninginum er ein fortreyt í tráanini eftir, at tað nýggja Tjóðleikhúsið skal virka sum eitt livandi, fjøltáttað og virkið leikhús, har eisini akustikkurin undirbyggir sýningar og tað virksemi sum húsið verður karmur um.

Húsið verður skipa soleiðis, at salirnir sínámillum vera akustiskt sundurskiltir, bæði konstruktivt og hvat viðvíkir rúmdisponering. Á hendan hátt verður gjørligt at tryggja eina ljóðisolatión millum salirnar, so teir kunnu nýtast samstundis óheftir av hvør ørðum. Eisini verða inngongdirnar hjá áskoðarum til salirnar útgjørdar við ljóðslúsum, so virksemi í foyer við café og ørðum ikki órógvar sýningar og venjingar.

Fyri at tryggja, at áskoðarin upplivir mest møgulia nærveru og intimitet í stóra salinum, verður salurin innrættaður við skránandi sirkulformaðum áskoðaratribunum í seks røðum umframt balkong við trimum røðum. Salurin verður stuttur og breiður, so avstandurin til pallin hjá áskoðarunum verður so lítil sum gjørligt. Hetta – umframt at loftið verður innrættað við niðurhongdum ljóðreflekterandi panelum hevur við sær, at viðurskiftini hjá leikarum at tosa salin upp uttan mikrofon og hátalarar vera optimal.

Eftirklangstíðin í Stóra Salinum verður umleið 0,8 sek., og miða verður eftir, at hendan eftirklangstíðin verður óheft av áskoðaratalinum. Harumframt verður tilfarð og yvirflatur í salinum valt og viðgjørt soleiðis, at eftirklangstíðin verður so frekvensóheft sum gjørligt.
Ljóðregulering verður neyvt integrerað í veggir og loft, so ljóð av pallinum á bestan hátt verður leitt út yvir áskoðaraplássini umframt at ekko og flutterekko ikki koma fyri við ákoðarapláss og á pallinum.
Palltorn og síðupallar verður viðgjørdir við ljóðabsorberandi tilfarði, so klangurin frá tí stóra palløkinum ikki ávirkar klangin úti í salinum.

Tá húsið verður opið fyri almenninigum í gerandisdegnum er umráðandi, at foyerin við m.ø. café og handli verður viðgjørd við ljóðregulerandi yvirflatum, so akustikkurin her upplivast sum fjálgur og innbjóðandi.

Útveggir skulu dimensionerast soleiðis, at larmur frá skipum ikki órógvar virksemið inni. Húsið verður sum heild tryggjað við ljóðisolerandi glasuppbygningi. Foyer og rúm við útveggir virka sum ljóðisolerendi bufferøki ímóti salunum. Veggir rundanum salirnar/pallirnar og palltornið verða úr tungum konstrukiónum (betong), so lágfrekventur larmur í salinum verður skerdur so nógv sum gjørligt.

# Teknisk viðurskiftir

## Alment

Bygningurin er hugsaður at verða bygdur eftir kendum prinsippum og við tilfari, sum er lætt at fáa hendur á.

## Konstruktiónir

Kjallari
Ein av stóru avbjóðingunum er at byggja kjallaran. Hann kemur at liggja undir vatnspeglinum, ikki tí at tað er nakar trupuleiki at gera hann tættan, men meira at útføra arbeiðið. Arbeiðið verður lagt soleiðis til rættis at tað verður grivið út fyri fyri kjallarnum. Vit rokna við at koma niður á hellu, ikki alt ov langt niðri. Spurningurin er bert um tað verður neyðugt at spreingja. Vit rokna eisini við at verandi kaj er so mikið tøtt, at vit kunnu halda holið rímuliga turt, at tað ber til at stoypa eitt undirlag fyri útveggjum, bjálving og gólvi. Innan farið verður í gongd ber til við boriprøvum, at staðfesta hvar hellan er.

Útveggir
Útveggir eru úr timbri. Har tað ikki eru timburveggir, eru tað glasframsíður við timburkarmum og rammum.

Berandi og stabiliserandi veggir
Ynskið er at bygnigurin er úr timbri, so nógv sum tað kann lata seg gera. Hetta er tí, at træ, sum flest kunnugt, er eitt tað mest burðardygga tilfari. Allir atskiljandi veggir verða gjørdir við timburkonstruktión. Har tað eru brunakrøv, sum kunnu verða torfør at røkka við timburveggjum verða hesir antin úr betong ella við stálkonstruktión.

Tað er ein sannroynd, at bygningurin liggur tætt við havnalagið, har óljóð frá skipum kann órógva virksemið í leikhúsinum, um ikki rætt verður atborið. Sambært akustikarnum, er neyðugt at byggja veggirnar rundanum salirnar úr betong. Hetta er fyri at taka lágfrekvent óljóð, sum eitt nú kemur frá Smyrli.

Betongveggirnir og palltornið virka eisini stabiliserandi veggir fyri vatnrættar lastir.

Í tí lægsta partinum av bygninginum, sum er foyer, er bygningurin fyri tað mesta træ. Súlur, bjálkar eru gjørdar úr límtræi. Takið er gjørt úr CLT (krosslaminerað timbur) dimensinerað til flagtak. Takið verður borið av límtræs bjálkum og súlum. Framsíðan er eisiini úr timbri við timburvindeygum við skrástívarum at stabilisera framsíðuna.

Etasjudekkini í tí hægra partinum verða hinvegin gjørd úr betong. Betongdekkið verður dimensionerað at bera framsíðurnar longri uppi. Tá bygningurin er so organiskur, sum hann er, eru "filigrandekk" vælegnað at brúka sum insitustoypt dekk við stórum spenni. Hugsað er enntá um at gera dekkini, sum "bobludekk" fyri at spara betong. Hetta er kend loysn, eisini í Føroyum.

## Brunaviðurskiftir

Bygningurin verður flokkaður sum nýtsluflokkur 3.
Bygningurin hevur náturliga brunadeildarveggir við øllum betongveggjunum rundan um salirnar. Tá størsta brunadeildin, sum er foyer er góðar 1.000 fermetrar er ikki neyðugt at sprinkla bygningin sambært "Eksempelsamlingen". Krav er hinvegin um "varslingsanlegg". Tá tað er lítil og eingin munur at einum varslingsanleggi og ABA er nærliggjandi at bygningurin hevur ABA.

Uppskotið tekur hædd fyri, at rýming og rýmingarleiðir er skipað eftir ásetingunum í "Eksempelsamlingini"

## Upphiting og ventilatión

Bygningurin hevur eina teknikkhædd millum veghædd og 3. Hædd. Á hendan hátt er lætt fyri innleggingarnar at koma runt í húsinum

Bygningurin er bjálvaður smb ásetingunum í BK17.

Bygningurin er upphitaður við sjóorku. Orkurúm er staðsett í kjallarnum til neyðugu innleggingarnar til sjóhitan. Hóskandi stað verður funnið til at seta vekslaran til skipanina. Nærliggjandi er at staðseta hann undir nýggja kajanlegginum.

Sjóorka er ein lághitaskipan, sum egnar seg best til gólvhita. Tá flestu gólvini eru stoypt, er hetta besta loysnin.

Bygningurin er fult ventileraður. Ventilatiónin endurnýtur størsta partin av hitanum í luftini og er eisini frægasta loysnin tá hugsað verður um burðardygd.

Spurningurin er um hvat vit gera við tað lágu sólina og nógva glasið sum framleiðir nógvan hita og kann skapa avbjóðingar fyri vitjandi og starvsfólk. Skotið verður upp at foyerurin verður útluftaður við gjøgnum vindeyguni. Skotið verður eisini upp, at seta kølipanelir uppi undir loftinum í skrivstovunum, sum kølir skrivstovuna tá heitast er. Kølipanelini verða køld við sjógvi

# Framsíðuskurður






95516

# Takgarðurin



Skurður av takgarðinum, 1:50

Á 3. hædd er gjørdur ein takgarður til starvsfólkini. Garðurin er umringaður av eini glas framsíðu, soleiðis at tá man er staddur á gongini uttanfyri ymisku skrivstovu hølini, so kemur er sera gott dagsljós inn á gongina og samstundis er takgarðurin eisini sera sjónligur eftir gongini. Glas framsíðan leggur upp til at man fær sær ein lítlan arbeiðs-steðg og fer inn í takgarðin at njóta staudu urtagarðin. Inni í garðinum er gjørt eitt umráð við timbur álegging, sum ger at man kann ferðast frítt til gongu og við koyristóli. Uppat timbur áleggingini eru staðbygdir benkur, sum gera tað møguligt at njóta løtuna í garðinum uttan í mun til hvar sólin er á degnum. Tað eru tvær inngongdir til garðin og tær eru bundnar saman við timburáleggini. Eisini er ein neyðtrappa í garðium upp til tak trappuna. Planturnar eru ymiskar í støðd, breidd, hædd og í uppliving. Tað skal kennast lætt og hugfarsligt at koma inn í takgarðin, og tað er sera umráðandi at allar staudurnar ikki blómsta somu tíð á árinum, soleiðis at man fær eitt livandi lit samans-pæl alt árið runt. Hetta ger at upplivingin í garðinum og eftir gongini er skiftandi.

# Takgarðurin




Flatmynd 3. hædd
1:300

## Plantulisti til tekjuna og takgarðin

| | |
|---|---|
| Deschampsia | cespitosa |
| Caltha | palustris |
| Rodgersia | pinnata |
| Darmera | peltata |
| Gunnera | magellanica |
| ajuga | reptans |
| Armeria | maritima |
| Sedum | herbstfreude |
| Rhodiola | rosea |
| Aconitum | napellus |
| Geranium | maculatum |
| Polygonum | vulgare |
| Hosta | rex |
| Crocosmia | lucifer |
| Ligularia | othello |
| Telekia | speciosa |
| Lysimachia | punctata |
| Rodgersia | podophylla |
| Osmunda | regalis |
| Ranunculus | ficaria |
| Papaver | dubium |
| Trollius | europaeus |
| Doronicum | caucasicum |
| Saxifraga | rivularis |
| Fargaria | meta |
| Heuchera | prince |
| Thymus | citrondourus |
| Astilbe | montgomery |
| Geum | rivale |
| Geranium | ingwersen |
| Luzula | sylvatica |
| Rubus | tricolor |
| Bergenia | cordifolia |
| Trollius | chinesis |
| Chrysanthemun | daisy |
| Geranium | phaeum |
| Allium | schoenoprasum |






Tekjan omaná bygninginum er øll plantað við fleiriára staudum, sum eru ymiskar í stødd, litum og formi - eins og takgarðurin. Endamálið við at plantað staudur og ikki gras, sum man vanliga hevur sæð í Føroyum, er at man í hesum førinum ynskir eina meira fjølbroytta tekju til fólkini, sum eru til gongu og uppihalda sær á tekjuni. Planturnar, sum verða brúktar eru ymisk grøs, fleiriára urtir við upprentum vakstrarlagi og krúpandi runnar, sí hjálagda plantulistan.
Hesin mátin at seta saman plantur uppá kann upplivast sum ein tilvísing til senuna, sum skiftir skap, lit og dýpd, alt eftir hvussu umstøðurnar eru gjørdar og settar saman. Íblásturin til plantusamansetingina kemur frá einum kunningum urtagarðsmanni, sum eitur Piet Oudolf. Hann er kendur fyri sínar villu plantusamansetingar, sum skifta við árstíðini og fyllir ein við ymiskum upplivingum. Sí myndinar.

Tekja





# Tilvísingar


















# Fermetrar



0. hædd kjallari

| | |
|---|---|
| | Alment inniøki |
| | Pallar |
| 270 m2 | Verkstaðir |
| | Nærgoymslur |
| | Fjargoymslur |
| | Starvsfólk og leikarar |
| | Tøkni til leikvirksemi |
| 81 m2 | Tøknirúm til húsið |
| 119 m2 | Annað (veggir, gongir, trappur o.l |
| Tilsamans 470 m2 | |



1. hædd veghædd

| | |
|---|---|
| 1.016 m2 | Alment inniøki |
| 992 m2 | Pallar |
| 657 m2 | Verkstaðir |
| 189 m2 | Nærgoymslur |
| | Fjargoymslur |
| 12 m2 | Starvsfólk og leikarar |
| | Tøkni til leikvirksemi |
| | Tøknirúm til húsið |
| 301 m2 | Annað (veggir, gongir, trappur o.l |
| Tilsamans 3.084 m2 | |



2. hædd

| | |
|---|---|
| 71 m2 | Alment inniøki |
| 64 m2 | Pallar |
| | Verkstaðir |
| | Nærgoymslur |
| 306 m2 | Fjargoymslur |
| | Starvsfólk og leikarar |
| 215 m2 | Tøkni til leikvirksemi |
| 283 m2 | Tøknirúm til húsið |
| 166 m2 | Annað (veggir, gongir, trappur o.l |
| Tilsamans 1.105 m2 | |



3. hædd

| | |
|---|---|
| 153 m2 | Alment inniøki |
| | Pallar |
| 65 m2 | Verkstaðir |
| | Nærgoymslur |
| | Fjargoymslur |
| 789 m2 | Starvsfólk og leikarar |
| | Tøkni til leikvirksemi |
| | Tøknirúm til húsið |
| 197 m2 | Annað (veggir, gongir, trappur o.l |
| Tilsamans 1.184 m2 | |



4. hædd

| | |
|---|---|
| 118 m2 | Alment inniøki |
| | Pallar |
| | Verkstaðir |
| | Nærgoymslur |
| | Fjargoymslur |
| | Starvsfólk og leikarar |
| | Tøkni til leikvirksemi |
| | Tøknirúm til húsið |
| 11 m2 | Annað (veggir, gongir, trappur o.l |
| Tilsamans 129 m2 | |

## Alment

Eitt tjóðleikhús er ein mentanarbygningur, har tilfar og detaljur eru á einum hægri støði enn vit vanliga kenna tað frá skrivstovubyngingum og skúlum. Tað eru ikki bygdir nógvir slíkir mentanarbygningar hesi seinastu árini og eru erfaringsprísirnir tískil ikki nógvir at samanbera og tó onkur verkætlan er at samanbera við. Prísir fyri skúlar og skrivstovubygningar eru hinvegin vælkendir.

## Um kostnaðarmeting

Alment kann sigast um eina kostnaðarmeting á hesum støðinum at hon ikki bara er eitt tal, men at hon útgreina hvat er íroknað og hvat liggur uttanfyri. Flestu metingar fara skeivar tí tær ikki eru avmarkaðar. Tað er eisini umráðandi eyðmerkja teir váðar, sum eru í verkætlandini og kapitalisera teir. Tað er somuleiðis umráðandi at meta um byggbari, bæði tá tað kemur til kendar/ókendar loysnir og hvussu tað er at koma til bygningin og rundan um bygningin og ikki minst hvussu eru møguleikarnir at skipa eitt vælvirkandi byggipláss. Týdningarmest er tó støddin. At støddin er realistisk og heldur støddina tá farið verður víðari. Tað eru óteljandi dømir um at metingar ikki hildu, av tí einføldu orsøk, at bygningurin endaði við at verða størri enn tað sum var roknað við.

## Stødd

Uppmálda støddin av uppskotinum er 5.942 m2 , sum er 322 m2 størri enn ásett í byggiskránni. Ein frágreiðing til hetta er, at bygningurin hevur eina "Roof Top Café" á takinum, sum við atkomu og vesum er 290 m2 . Hetta er ikki nevnt í byggiskránni. Rúmskráin er væl lýst og er uppskotstillarin av tí áskoðan, at bygningurin í framhaldandi projektering fer at halda støddina.

## Fermeturkostnaður

Fermetrakostnaðurin fyri skúlar, skrivstovur og mentanarbygningar liggur í løtuni millum 28 og 40 túsund krónur fyri fermeturin alt íroknað. Vit meta at hesin bygningurin er dýrari enn hetta. Hetta grunda vit á at her eru nógv høg rúm og harvið stór rúmd, sum eisini kostar. Vit meta eisini at útgerð og innbúgv eisini fyllir meira enn vanligt. Annað sum ger seg galdandi er at roknað er við einum kjallara, sum kemur at liggja undir vatnspegilinum og er nógv dýrari enn vanligt. Nakað sum hinvegin fær prísin niður, er at Tjóðpallurin liggur á einari kaj har lítið og einki jørðarbeiði skal gerast, annað enn kjallarin. Hetta ger stóran mun. Tað er eisini lætt at koma runt um bygningin og lætt at fáa eitt effektivt byggipláss. Sjálvt um bygningurin er organiskur, er alt kendar loysnir, sum eru royndar fyrr og allir arbeiðstakarar kunnu bjóða uppá.

Vit hava roknað út, at samlað er fermeturkostnaðurin í mesta lagi 49.000 tús kr fermeturin.

## Hvat er íroknað?

Í fermeturkostnaðinum er roknað við at øllum, eisini ókent, men ikki prís- og lønarvøkstur. Prísindeksið er dags dato.

Avmarkingin er, at kajanleggini eru ikki íroknað, eins og vegir og parkeringspláss. Roknað er við at lendið rundanum bygningin er íroknað í eini frástøðu upp til 10-15 metrar. Brúgvin og trapputornið er ikki íroknað, men rampan upp á takið er íroknað. Niðurtøka av verandi bygningum er ikki partur av verkætlanini.

## Óvissa

Í løtuni eru prísirnir svingandi, at tað næstan er ógjørligt at gera metingar, sum eru fullkomiligar rættar. Hinvegin síggja vit at tá okkurt fer upp, so fer okkurt annað niður. Okkara royndir eru at størsta óvissan er støddin. Um tað eydnast at halda støddina og ikki fara út um byggifeltið, so er óvissan 7% (har útfallsrúmið er 67%)

## Meting

## Alment
Eitt tjóðleikhús er ein mentanarbygningur, har tilfar og detaljur eru á einum hægri støði enn vit vanliga kenna tað frá skrivstovubyngingum og skúlum. Tað eru ikki bygdir nógvir slíkir mentanarbygningar hesi seinastu árini og eru erfaringsprísirnir tískil ikki nógvir at samanbera og tó onkur verkætlan er at samanbera við. Prísir fyri skúlar og skrivstovubygningar eru hinvegin vælkendir.

## Um kostnaðarmeting
Alment kann sigast um eina kostnaðarmeting á hesum støðinum at hon ikki bara er eitt tal, men at hon útgreina hvat er íroknað og hvat liggur uttanfyri. Flestu metingar fara skeivar tí tær ikki eru avmarkaðar. Tað er eisini umráðandi eyðmerkja teir váðar, sum eru í verkætlandini og kapitalisera teir. Tað er somuleiðis umráðandi at meta um byggbari, bæði tá tað kemur til kendar/ókendar loysnir og hvussu tað er at koma til bygningin og rundan um bygningin og ikki minst hvussu eru møguleikarnir at skipa eitt vælvirkandi byggipláss. Týdningarmest er tó støddin. At støddin er realistisk og heldur støddina tá farið verður víðari. Tað eru óteljandi dømir um at metingar ikki hildu, av tí einføldu orsøk, at bygningurin endaði við at verða størri enn tað sum var roknað við.

## Stødd
Uppmálda støddin av uppskotinum er 5.942 m2 , sum er 322 m2 størri enn ásett í byggiskránni. Ein frágreiðing til hetta er, at bygningurin hevur eina “Roof Top Café” á takinum, sum við atkomu og vesum er 290 m2 . Hetta er ikki nevnt í byggiskránni. Rúmskráin er væl lýst og er uppskotstillarin av tí áskoðan, at bygningurin í framhaldandi projektering fer at halda støddina.

## Fermeturkostnaður
Fermetrakostnaðurin fyri skúlar, skrivstovur og mentanarbygningar liggur í løtuni millum 28 og 40 túsund krónur fyri fermeturin alt íroknað. Vit meta at hesin bygningurin er dýrari enn hetta. Hetta grunda vit á at her eru nógv høg rúm og harvið stór rúmd, sum eisini kostar. Vit meta eisini at útgerð og innbúgv eisini fyllir meira enn vanligt. Annað sum ger seg galdandi er at roknað er við einum kjallara, sum kemur at liggja undir vatnspegilinum og er nógv dýrari enn vanligt. Nakað sum hinvegin fær prísin niður, er at Tjóðpallurin liggur á einari kaj har lítið og einki jørðarbeiði skal gerast, annað enn kjallarin. Hetta ger stóran mun. Tað er eisini lætt at koma runt um bygningin og lætt at fáa eitt effektivt byggipláss. Sjálvt um bygningurin er organiskur, er alt kendar loysnir, sum eru royndar fyrr og allir arbeiðstakarar kunnu bjóða uppá.

Vit hava roknað út, at samlað er fermeturkostnaðurin í mesta lagi 49.000 tús kr fermeturin.

## Hvat er íroknað?
Í fermeturkostnaðinum er roknað við at øllum, eisini ókent, men ikki prís- og lønarvøkstur. Prísindeksið er dags dato.

Avmarkingin er, at kajanleggini eru ikki íroknað, eins og vegir og parkeringspláss. Roknað er við at lendið rundanum bygningin er íroknað í eini frástøðu upp til 10-15 metrar. Brúgvin og trapputornið er ikki íroknað, men rampan upp á takið er íroknað. Niðurtøka av verandi bygningum er ikki partur av verkætlanini.

## Óvissa
Í løtuni eru prísirnir svingandi, at tað næstan er ógjørligt at gera metingar, sum eru fullkomiligar rættar. Hinvegin síggja vit at tá okkurt fer upp, so fer okkurt annað niður. Okkara royndir eru at størsta óvissan er støddin. Um tað eydnast at halda støddina og ikki fara út um byggifeltið, so er óvissan 7% (har útfallsrúmið er 67%)

## Meting

| | | |
|---|---|---|
| 0.0 | Byggipláss | 27.311.952 |
| 1.1 | Jørðarbeiði | 10.774.210 |
| 1.2 | Lendisarbeiði | 6.464.526 |
| 1.3 | Betongarbeiði | 25.858.104 |
| 1.4 | Stálarbeiði | 6.475.967 |
| 1.5 | Timburarbeiði | 81.022.059 |
| 1.6 | Gólvarbeiði | 5.492.130 |
| 1.7 | Múraraarbeiði | 2.154.842 |
| 1.8 | Málaraarbeiði | 4.740.652 |
| 1.9 | Kloakk | 3.447.747 |
| 1.10 | HVS og ventilatión | 24.457.457 |
| 1.11 | El | 17.238.736 |
| | | |
| 2.1 | Útgerð | 10.287.360 |
| 2.2 | Innbúgv | 9.959.040 |
| | | |
| 3.1 | List | 3.232.263 |
| | | |
| 4.1 | Umsiting | 4.714.612 |
| 4.2 | Projektering, fakeftirlit | 33.865.734 |
| 4.3 | Byggileiðsla | 6.464.526 |
| 4.4 | Tryggingar | 2.154.842 |
| 4.5 | Útlegg | 1.194.814 |
| 4.6 | Íbindingargjøld | 485.850 |
| | | |
| **5.0** | **Tilsamans kr** | **287.797.424** |

# TJÓÐLEIKHÚS





óðleikhúsið endurskapa eitt ítøkiligt samband millum býin
g Skansan.

n nýggj og trygg gongufarleið frá bryggjutorginum og
Skansan verður innbygdur partur í arkitekturinum hjá
óðpallinum.

Tjóðleikhúsið liggur á einum vegamóti millum bý, bingjuhavn og innsigling.

Bygningurin hevur eitt organsikt skap sum viðurkennir allar ættir. Bygningurin vendir ongum baki.

Sniðgevingin av framsíðuni er hevur sama tátt runt um bygningin og skapið kann avlesast frá øllum ættum.

Íblástur
Føroyski dansurin, livandi veran, dramaið, felagsskapurin, stevini og taktirnar eru íblásturin til arkitekturin í tjóðleikhúsinum.

Føroyski dansurin er felagsskapur og mentanarligur arvur. Hann er demokratiskur - øll kunnu vera við.

Flestu gamlar mentanir hava okkurt slag av skipaðari læring við rørslu/kroppi, tað kann vera dansur og ofta er tað kampsportur so sum thai chi, karatee jiujitsu osfr Tað sum eyðkennir tílíkar gamlar kropsteknikkir er at centrið “the core” verður hildið í water, soleiðis er eisini við føroyska dansinum. Flestu føroyingar vita tað uttan at varnast, tí leggja vit skjótt til merkis tá ein útlendingur kemur upp í dansin. Tey flyta centrið upp og niður, meðan føroyingarnir halda tað vatnrætt.
Í felag at halda centrið vatnrætt merkjur at ringurin gerst ein

sjónleikin, verður fokus flutt frá okkum sjálvum og yvir á forteljngina - vit gloyma ego og kunnu lata upp fyri at gerast kensluliga rørd av onkrum øðrum/sjónleikinum.

Føroyski dansurin er upp á eina og somu tíð unisonur og mangfoldigur. Øll kunnu vera við, við teirra ymsu skapum og lyndi og øll syngja sama lag og tekst.

Endurtøkurnar og at “køre over venepumperne” ger at dansurin hann vera trancenderandi. Endurtøkurnar og ringurin virkar hypnotiserandi og venupumpurnar útloysa serotonin, sum tá ið man rennur leingi.




Støðumynd mát 1:500




Skurður mát 1:200



Modellmynd




Skurður






Flatmynd 2. hædd mát 1:200



Flatmynd veghædd1. hædd mát 1:200



Fornminni
Skansin er eitt av okkara fremstu fornminnum og tað einasta av sínum slagi.
Tá skansin var bygdur, var hann verjan hjá havnarfólki og ímóti sjórænarum.
Meðan í dag liggur skansin óvirkin og er ein tíðarlummi og eitt fríøki, mitt í meldrinum við havnarlagið.

Nýggj gonguferleið
Ferðafólk hava altíð verið drigin at Skansanum. Vaksin og børn hava spákað har og brúkt skansan sum sítt frístað og spæliplás.

Síðan sambandið millum Skansabrekku og Skansan varð slitið, hevur verið tvørligt hjá fólki at sleppa út á Skansan til gongu og nærum ómøguligt hjá rørslutarnaðum.
Høvuðstætturin hjá nýggja tjóðleikhúsinum er at bjóða fólki eina nýggja og trygga gonguferleið út á Skansan.

Tung ferðsla
Tung ferðsla frá bingjuhavnini koyrir framvið Skansanum og koyrir úr býnum eftir vegnum Yviri Við Strond. Smb. heildarætlanini hjá Tórshavnar kommunu, verður sjálvstøðugt koyrispor gjørt til tunga ferðslu frá bingjuhavnini.

Skansin er sostatt umskarðaður av koyrivegi við tungari ferðslu og farleiðin er vandamikil hjá fólki til gongu.

Trappan
Ein 276 metrar long trappa snarar seg um Tjóðleikhúsbygningin og førir teg frá Bryggjutorginum og upp á takið í 14m hædd, hagani ein brúgv førir teg út á Skansan.

Trapputorn
Mælt verður til at gera eitt trapputorn við lift við vegjaðaran Tjóðleikhúsmegin, sum førir upp til brúnna frá Tjóðleikhúsinum. Við hesum verður trygga farleiðin til Skansan eisini møgulig hjá koyristólsbúkarum.

Brúgv
Brúgvin røkkur frá Tjóðleikhúsinum á kotu 15.73 og til parkeringsøki við Skansan á kotu 16,0. Brúgvin er íalt 40m long og er longsta spennið 30m millum trapputorn og Skansan.
Fríhæddin undir brúnnið er 11,5m, til samanberingar er fríhæddin á motorvegsbrúm 4,5m. Brúgvin kemur sostætt ikki at darva farmaflutningi úr bingjuhavnini.

Høvuðsdisponering

Bygningurin er í trimum hæddum, við eini kafé á takinum. Ein glasbygningur verður bygdur runt um pallhústornið fyri at skapa ein ljóðbuffara um tornið. Glasbygningurin verður skipaður soleiðis at í honum verður pláss fyri eini kafé.

Hædd 3
Starvsfólk í umsitingini og leikarar verða lyft upp á triðju hædd, hagani teey hava gott útsýnið yvir býin og innsiglingina.

Hædd 1
Á veghæddini, hædd 1, eru funktiónir sum hava tørv á beinleiðis sambandi við tún og koyriveg. Eitt nú Foyer, pallar og verkstøð.
Leikhúsgestir hava lætta atgongd til bryggju og torg frá Foyer økinum og verkstøðini hava lætta atgongd til koyrivegin í sambandi við til- og frá koyring av vørum.

Hædd 2
ein innskotin hædd liggur ímillum hædd 1 og 3, sum eru hølir ið liggja í ein krans rundan um pallarnar. Í hesum høllum eru tøknirúm sum eru knýtt at pallunum og húsinum.Her liggja eisini fjargoymslur við góðum sambandi til verkstøð umvegis vørulyft.




Tjóðleikhúsið verður drívmegin, sum fer at skapa lív og felagsskap á havnaøkinum, alt árið.

Tjóðleikhúsið er fyrst og fremst ein pallur til framførslur innan leiklistina.
Men, Tjóðleikhúsið er eisini ein mentanarstovnur sum ynskir at koma á tal við umheimin. Tað er har viðurskifti og støður verða viðgjørd, sum havar týdning fyri okkum sum einstaklingar og samfelagið sum heild. Tjóðleikhúsið skapar karmar til samtalu í- og uttanfyri leikhúsið. Her hittast allir samfelagsbólkar, leik og lærd.

Vit vitja pallarnar fyri at síggja og hoyra aktuellar framførslur, vit møtast við vinfólki á kaféini til eitt prát afturvið einum kaffimunni ella einum góðum bita. Góðveðursdagar stevna vit oman í havnina og seta okkum við bryggjukantin at dyppa føtur í sjógvin. Ella, vit taka "trappuna" við kós móti skansanum og steðga á eina løtu á takinum. Har "rooftop" kaféin við panorama útsýnið yvir býin og bryggjutorgið. Har ber til at fylgja við í virkseminum á torginum, fáa eitt prát við kenningar og njóta ein ís ella heitt kakao á terrassuni framman fyri "rooftop kaféini".

Á Bryggutorginum ....gera klárt til útileik..... skúlaflokkur ger seg út at fara við sluppuni, á leikhúsbryggjuni er dansiframførsla

Havnabussurin er komin av vstarubryggju við ferðafólki og leggur at á leikhúsbryggjuni og

95516

95516

# Handan leiktjaldið



Flatmynd 4. hædd mát 1:200




Uttanhýsis starvsfólk
Starvsfólk sum ikki hava fast arbeiðsstað á tjóðpallinum, men sum eru knýtt at virkseminum í eitt tíðarskeið, eitt nú leikstjóri, pallstjóri, dramaturgur v.fl. skulu hava eitt skrivstovupláss og atgongd til fundarhølir, kopirúm osfr.
Eitt framløgurúm nærhendis trapputorninum móti eystri, kann m.a. brúkast til listarliga leiðslutoymi, har modell av scenografiini, búnatekningar, tekstuppskot, búnaprøvar o.a. kunnu liggja.

Eitt virkið leikhús
Tjóðleikhúsið er virkið alt árið. Ímeðan ein leikur verður sýndur verður næsti leikur framleiddur, alt ímeðan triðji leikurin verðu fyrireikaður osfr. Henda áhaldandi tilgongdin krevur at tjóðleikhúsið rúmar tí krevst, til uppsetan av einum leiki. Alt frá fyrireiking av einum nýggjum leikum, til venjing av framførðslum, framleiðslu av pallist og sýning av leikum.
ein leikur er ein framleiðsla sum krevur at fólk innan fleiri fak- og listagreinir samstarva. Í innrættingini av tjóðpallinum er dentur lagdur á at arbeiðsumstøðurnar skulu bæði verða praktiskar og kveikjandi. Tað skal verða sjónligt samband millum fakini og lætt at samskifta og samstarva. Við betri innlitið í virksemi hjá starvsfeløgunum, verður betri forstáilsi og lættari at skapa kensluna av at røkka felags málum.

Umsiting
Umsitingin, tann dagliga leiðslan, situr á triðju hædd við góðum útsýnið yvir býin.
billet- og kaffisøla

Lyft og trappa hava beinleiðis samband við tvær starvsfólkainngongdir ávikavist móti norði og móti eystri á veghæddini. lyft og trappa móti norði hevur beinleiðis samband við foyerin.
Starvsfólk sum arbeiða í billettsøluni og kaffistovuni, hava samband við starvsfólkahølini á triðju hædd umvegis lyftu og trappu. Billettsølan og kaffisølan eru innrættaði við sama disk, sum ger tað møguligt hjá einum starvsfólki at røkja báðar funktiónirnar. Sølubúðin er opin framsýning sum liggur við sjónligum sambandi til billettsøluna.

Leikarar
Arbeiðið sum útinnandi listafólk á einum leikpalli, inniber m.a. at miðla kenslur umvegis leik, dans og sang. Henda eksponering og kenslan av húðleysheit setur høg krøv til teirra umhvørvið. Skiftirúmið, garderoban, er teirra frírúm, har tey løða upp orku, repetera tekst, hugsavna seg ella taka bráddin av nervunum. Garderoban hjá leikarunum, er rúmlig. Tveir leikarar eru um hvørja garderobu. Hár- og sminkurúmið liggur á triðju hædd, nær við garderoburnar hjá leikarunum. Felagstilhaldsrúmið eisini rópt "greenroom" liggur nærhendis eystara trapputorn, sum hevur beinleiðis samband við pallarnar á hædd 1.
Greenroom er savningarstaður hjá leikarum og teknikkarum ímillum venjingar og ímeðan sýningin er. Eitt eykað greenroon liggur á hædd 1, við umstøðum til búnaskift og at pifta sminkuna upp.

# Fyri framman leiktjøldini - leikhúsgestir



Flatmynd 3. hædd mát 1:200




Atmosfera
Ein vitjan á leikhúsinum byrjar í Foyerini. Tú skalt merkja at tú trínir inn í ein annan heim, sum lyftir teg upp úr gerandissjabbinum... og tínir sansir kveikjast.
Foyerin skal megna at fáa teg sum leikhúsgest at kenna teg serstakan og pallsettan. Títt forvitni er vakt og spenningurin eftir at síggja sýningina veksur.

Tjaldveggur
Ein bylgjuskapaður veggur, sum ímyndar eitt leiktjald, eyðmerkir ein greiðan skilna ímillum gestaøki og leikøki.
Í tí tú fer úr foyerinum og trínur inn um "leiktjaldið", broytist umhvørvið týðiliga. Handan tjaldið er alt óljóðið frá gerandisdegnum horvið og gandakenda ljóssetingin av rúminum setir teg í rætta huglagið.

Foyer
Foyerin er rúmlig og røkkur um allar tríggjar salirnar. Hagani er inngongd til stóra sal, líttla sal og Black Boxina.
Bylgjurnar í tjaldvegginum geva eina ábending um hvar salirnir eru og lætt er at finna rætta salin. Foyerin er rúmlig og kann rúma ymsum innrættingum. Hon er nóg rúmlig til at allir tríggir salir, hava sýningar sama dag.
Foyerin hevur høgt til loftið móti tjaldvegginum og er lægri í uppihaldsøkinum úti við fasaduna.
Høvuðsinngongdin er atkomulig fyri øll og hevur aut.skjótihurðar. Tættast við inngongdina liggja toilettir og garderoba.

Billett- og kaffistova
Ein felags diskur til billett- og kaffisølu, stendur framman fyri tjaldvegginum og røkkur um allan stóra sal. billettsølan er tættast móti inngondini.
Kaffistovan hevur vælútgjørdan køk og hevur umstøður til at bjóða eina matarskrá. Soleiðis at kaffisølan kann bjóða til Bruntsj, miðmála og døgurða og vera virkin allar dagar, eisini í tíðarsekiðinum ímillum sýningarnar.

Sølubúð
Ein innrætting til sølu av skreytlutum, listabókum, plakatum o.øðrum viðkomandi lutum, er næst høvuðsinngongdini og kann røkkast hjá starvsfólkum í billetsøluni. Sølubúðin er innrættað sum eitt opið framsýningarøkið, við innrættingum sum eru innbjóðandi, eisini hjá børnum. Eitt nú kunnu verða innrættingar við dukkuteatrum sum børnini kunnu røra við og evt. royna seg í kynstrinum at halda snóradukkum.

Framsýningar
Til serlig høvir, temadagar, sersýningar og annað ber til at seta upp framsýningar. Foyerin er skipað soleiðis, at pláss er fyri at hava framsýningar standandi í eina tíð. Framsýning kann vitjast av ymsum áhugabólkum, skúlaflokkum, gestum sum vitja í kaffistovuni umframt leikhúsgestum til sýningar. Framsýningin er tá við til bæði at skapa meira virksemi í húsinum og til at røkka út til fleiri fólk.

"Roof Top"
Ein kafé við útsýni yvir býin er staðsett á takinum, framman fyri pallhústornið. Atgongd er til kaféina frá Foyer og frá trappuni. Kaféin kann verða eitt útferðarmál hjá fólki sum heild, men kann eisini verða ein partur av leikhúsvitjanina. Tað kann til dømis verða har gestirnir møtast aftan á sýningina og skifta orð um tað tey hava sæð, ímeðan tey njóta býarljósini og stórbýardámin.







Mynd av Tjóðpallinum sæð frá Bursatanga

# Tekja og gróður

Á 3. hædd er gjørdur ein takgarður til starvsfólkini. Garðurin er umringaður av eini glas framsíðu, soleiðis at tá man er staddur á gongini uttanfyri ymisku skrivstovu hølini, so kemur er sera gott dagsljós inn á gongina og samstundis er takgarðurin eisini sera sjónligur eftir gongini. Glas framsíðan  leggur upp til at man fær sær ein lítlan arbeiðssteðg og fer inn í takgarðin at njóta staudu urtagarðin. Inni í garðinum er gjørt eitt umráð við timbur álegging, sum ger at man kann ferðast frítt til gongu og við koyristóli. Uppat timbur áleggingini eru staðbygdir benkur, sum gera tað møguligt at njóta løtuna í garðinum uttan í mun til hvar sólin er á degnum. Tað eru tvær inngongdir til garðin og tær eru bundnar saman við timburáleggini. Eisini er ein neyðtrappa í garðium upp til tak trappuna. Planturnar eru ymiskar í stødd, breidd, hædd og í uppliving. Tað skal kennast lætt og hugfarsligt at koma inn í takgarðin, og tað er sera umráðandi at allar staudurnar ikki blómsta somu tíð á árinum, soleiðis at man fær eitt livandi lit samanspæl alt árið runt. Hetta ger at upplivingin í garðinum og eftir gongini er skiftandi.

Tekjan omaná bygninginum er øll plantað við fleiriára staudum, sum eru ymiskar í stødd, litum og formi - eins og takgarðurin. Endamálið við at plantað staudur og ikki gras, sum man vanliga hevur sæð í Føroyum, er at man í hesum førinum ynskir eina meira fjølbroytta tekju til fólkini, sum eru til gongu og uppihalda sær á tekjuni.
Planturnar, sum verða brúktar eru ymisk grøs, fleiriára urtir við upprentum vakstrarlagi og krúpandi runnar, sí hjálagda plantulistan.
Hesin mátin at seta saman plantur uppá kann upplivast sum ein tilvísing til senuna, sum skiftir skap, lit og dýpd, alt eftir hvussu umstøðurnar eru gjørdar og settar saman. Íblásturin til plantusamansetingina kemur frá einum kunningum urtagarðsmanni, sum eitur Piet Oudolf. Hann er kendur fyri sínar villu plantusamansetingar, sum skifta við árstíðini og fyllir ein við ymiskum upplivingum. Sí myndinar.













# Teknisk viðurskifti

Alment
Bygningurin er hugsaður at verða bygdur eftir kendum prinsippum og við tilfari, sum er lætt at fáa hendur á.

Konstruktiónir

Kjallari
Ein av stóru avbjóðingunum er at byggja kjallaran. Hann kemur at liggja undir vatnspeglinum, ikki tí at tað er nakar trupuleiki at gera hann tættan, men meira at útføra arbeiðið. Arbeiðið verður lagt soleiðis til rættis at tað verður grivið út fyri fyri kjallarnum. Vit rokna við at koma niður á hellu, ikki alt ov langt niðri. Spurningurin er bert um tað verður neyðugt at spreingja. Vit rokna eisini við at verandi kaj er so mikið tøtt, at vit kunnu halda holið rímuliga turt, at tað ber til at stoypa eitt undirlag fyri útveggjum, bjálving og gólvi. Innan farið verður í gongd ber til við boriprøvum, at staðfesta hvar hellan er.

Útveggir
Útveggir eru úr timbri. Har tað ikki eru timburveggir, eru tað glasframsíður við timburkarmum og rammum.

Berandi og stabiliserandi veggir
Ynskið er at bygnigurin er úr timbri, so nógv sum tað kann lata seg gera. Hetta er tí, at træ, sum flest kunnugt, er eitt tað mest burðardygga tilfari. Allir atskiljandi veggir verða gjørdir við timburkonstruktión. Har tað eru brunakrøv, sum kunnu verða torfør at røkka við timburveggjum verða hesir antin úr betong ella við stálkonstruktión.

Tað er ein sannroynd, at bygningurin liggur tætt við havnalagið, har óljóð frá skipum kann órógva virksemið í leikhúsinum, um ikki rætt verður atborið. Sambært akustikarnum, er neyðugt at byggja veggirnar rundanum salirnar úr betong. Hetta er fyri at taka lágfrekvent óljóð, sum eitt nú kemur frá Smyrli.




Betongveggirnir og palltornið virka eisini stabiliserandi veggir fyri vatnrættar lastir.

Í tí lægsta partinum av bygninginum, sum er foyer, er bygningurin fyri tað mesta træ. Súlur, bjálkar eru gjørdar úr límtræi. Takið er gjørt úr CLT (krosslamineráð timbur) dimensinerað til flagtak. Takið verður borið av límtræs bjálkum og súlum. Framsíðan er eisiini úr timbri við timburvindeygum við skrástívarum at stabilisera framsíðuna.

Etasjudekkini í tí hægra partinum verða hinvegin gjørd úr betong. Betongdekkið verður dimensionerað at bera framsíðurnar longri uppi. Tá bygningurin er so organiskur, sum hann er, eru "filigrandekk" vælegnað at brúka sum insitustoypt dekk við stórum spenni. Hugsað er enntá um at gera dekkini, sum "bobludekk" fyri at spara betong. Hetta er kend loysn, eisini í Føroyum.

Brunaviðurskiftir

Bygningurin verður flokkaður sum nýtsluflokkur 3.
Bygningurin hevur nátúrliga brunadeildarveggir við øllum betongveggjunum rundan um salirnar. Tá størsta brunadeildin, sum er foyer er góðar 1.000 fermetrar er ikki neyðugt at sprinkla bygningin sambært "Eksempelsamlingen". Krav er hinvegin um "varslingsanlegg". Tá tað er lítil og eingin munur at einum varslingsanleggi og ABA er nærliggjandi at bygningurin hevur ABA.

Uppskotið tekur hædd fyri, at rýming og rýmingarleiðir er skipað eftir ásetingunum í "Eksempelsamlingini"

Upphiting og ventilatión
Bygningurin hevur eina teknikkhædd millum veghædd og 3. Hædd. Á hendan hátt er lætt fyri innleggingarnar at koma runt í húsinum

Bygningurin er bjálvaður smb ásetingunum í BK17.

Bygningurin er upphitaður við sjóorku. Orkurúm er staðsett í kjallarnum til neyðugu innleggingarnar til sjóhitan. Hóskandi stað verður funnið til at seta vekslaran til skipanina. Nærliggjandi er at staðseta hann undir nýggja kajanlegginum.

Sjóorka er ein lághitaskipan, sum egnar seg best til gólvhita. Tá flestu gólvini eru stoypt, er hetta besta loysnin.

Bygningurin er fult ventileraður. Ventilatiónin endurnýtur størsta partin av hitanum í luftini og er eisini frægasta loysnin tá hugsað verður um burðardygd.

Spurningurin er um hvat vit gera við tað lágu sólina og nógva glasið sum framleiðir nógvan hita og kann skapa avbjóðingar fyri vitjandi og starvsfólk. Skotið verður upp at foyerurin verður útluftaður við gjøgnum vindeyguni. Skotið verður eisini upp, at seta kølipanelir uppi undir loftinum í skrivstovunum, sum kølir skrivstovuna tá heitast er. Kølipanelini verða køld við sjógvi

Ljóðviðurskifti

Ein neyv planlegging av ljóðviðurskiftunum í bygninginum er ein fortreyt í tráanini eftir, at tað nýggja Tjóðleikhúsið skal virka sum eitt livandi, fjøltáttað og virkið leikhús, har eisini akustikkurin undirbyggir sýningar og tað virksemi sum húsið verður karmur um.

Húsið verður skipa soleiðis, at salirnir sínámillum vera akustiskt sundurskiltir, bæði konstruktivt og hvat viðvíkir rúmdisponering. Á hendan hátt verður gjørligt at tryggja eina ljóðisolatión millum salirnar, so teir kunnu nýtast samstundis óheftir av hvør øðrum. Eisini verða inngongdirnar hjá áskoðarum til salirnar útgjørdar við ljóðslúsum, so virksemi í foyer við café og øðrum ikki órógvar sýningar og venjingar.

Fyri at tryggja, at áskoðarin upplivir mest møgulia nærveru og intimitet í stóra salinum, verður salurin innrættaður við skránandi sirkulformaðum áskoðaratribunum í seks røðum umframt balkong við trimum røðum. Salurin verður stuttur og breiður, so avstandurin til pallin hjá áskoðarunum verður so lítil sum gjørligt. Hetta – umframt at loftið verður innrættað við niðurhongdum ljóðreflekterandi panelum hevur við sær, at viðurskiftini hjá leikarum at tosa salin upp uttan mikrofon og hátalarar vera optimal.

Eftirklangstíðin í Stóra Salinum verður umleið 0,8 sek., og miða verður eftir, at hendan eftirklangstíðin verður óheft av áskoðaratalinum. Harumframt verður tilfarð og yvirflatur í salinum valt og viðgjørt soleiðis, at eftirklangstíðin verður so frekvensóheft sum gjørligt.
Ljóðregulering verður neyvt integrerað í veggir og loft, so ljóð av pallinum á bestan hátt verður leitt út yvir áskoðaraplássini umframt at ekko og flutterekko ikki koma fyri við ákoðarapláss og á pallinum.
Palltorn og síðupallar verður viðgjørdir við ljóðabsorberandi tilfarði, so klangurin frá tí stóra palløkinum ikki ávirkar klangin úti í salinum.

Tá húsið verður opið fyri almenninigum í gerandisdegnum er umráðandi, at foyerin við m.ø. café og handli verður viðgjørd við ljóðregulerandi yvirflatum, so akustikkurin her upplivast sum fjálgur og innbjóðandi.

Útveggir skulu dimensionerast soleiðis, at larmur frá skipum ikki órógvar virksemið inni. Húsið verður sum heild tryggjað við ljóðisolerandi glasuppbygningi. Foyer og rúm við útveggir virka sum ljóðisolerendi bufferøki ímóti salunum. Veggir rundanum salirnar/pallirnar og palltornið verða úr tungum konstrukiónum (betong), so lágfrekventur larmur í salinum verður skerdur so nógv sum gjørligt.



Mynd frá garðhava á 3. hædd





95516